
Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Royna at fáa yvirlit yvit hvat álvarsliga kreppan hjá Iona Energy merkir fyri Atlantic Petroleum

**Jógvan Hugo Gardar**

19.11.2015 - 19:10

Oljan.fo

Kreppan í kanadiska olju- og gassfelagnum Iona Energy rakar á einhvønn hátt Atlantic Petroleum, tí føroyska felagið samstarvar við Iona Energy um Orlando-útbyggingina.

Iona Energy boðaði í gjár frá í einum tíðindaskrivi at ein roynd at fáa bjarga felagnum fíggjarliga er miseydnað. Orsøkin er at ein sokallað "farm out"-avtalað í samband við ognarskapin í Orlando-ætlanini miseydnaðist.

Iona Energy hevur tí boða frá at teirra bretsku dótturfeløg Iona Energy Company og Iona UK Huntington Limited eftir øllum at døma noyðast at leggja kortini á borðið, og senda feløgini í skiftirættin.

Atlantic Petroleum hevur í kvøld boða frá at tey flyta almannakunngeringina av rokniskapinum fyri triðja ársfjórðing til tann 30. november. Upprunaliga skuldi hann leggjast fram tann 25. november.

Nevndin í Atlantic Petroleum arbeiðir í løtuni við at fáa yvirlit yvir hvat tað kemur at merkja fyri føroyska felagið, at Iona má gevast við virkseminum.

Atlantic Petroleum sigur í fráboðani at tey venda aftur tá tey hava nakað at boða frá um málið